gult cyan magenta svart





## VIT ERU FLUTTIR

Vit skulu boða frá, at ***Tórshavnar Maskinverkstaður*** er fluttur út á **vestara kajøki**, í kranahøllina, við síðuna av Saltsøluni

***Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður***
Vestara Bryggja • Box 3135 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 319992 • Fartel. 219992 • Fax 318992

# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

### 620 Runavík

Søkt verður eftir **avloysarum fyri sjúkrasystrar og sjúkrahjálparar / sosial - heilsuassistentar** í tíðarskeiðnum frá **1. juni 2001 til 31. august 2001**.

Løn sambært sáttmála við ávikavist Sjúkrasystrafelag Føroya og Føroya Sjúkrahjálparafelag / Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðumannin, tlf. 448185 ella tlf. 448201.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. verður at senda til

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim**
620 Runavík
att.: fyristøðumaðurin

innan 30. mars 2001.

# Frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag

Limafundur verður í Fámjin týskvøldið 27/2 kl. 19.00, í Hvalba tórskvøldið 8/3 kl. 19.00.

Aðalfundurin verður í Øravík mánakvøldið 12/3 kl. 19.00.

Allir limir eiga at møta.

# Kunngerð um Avsláttur í elprísum

Avtala er gjørd ímillum SEV og Føroya Landsstýri um umsiting av stuðli landskassan til kappingartillagandi tiltøk í 2001.

Stuðulin verður veittur sum ávsláttur í elprísum.

Avslátturin verður veittur frá 1/1 til 31/12 2001 og verður umsitin soleiðis, at allar elinnleggingar, sum koma undir gjaldsskránna hjá SEV fyri ídnað, landbúnað, fiskaaling og fiskivinnu, fáa 3,3 oyru/kWh í avsláttri fyri tann partin av elnýtsluni, sum fyri hvørja elinnlegging sær er omanfyri 10.000 kWh um árið.

Er uppgerðarskeiðið minni enn eitt ár, verður hvørt uppgerðartíðarskeið umroknað til eitt ár, og avslátturin fyri uppgerðarskeiðið ásettur lutfalsliga í mun til roknaðu ársnýtsluna.

Tórshavn, tann 24. februar 2001

SEV **Elfelagið S.E.V**

# Aðalfundur í P/F KALL

Aðalfundur verður í partafelagnum KALL (skr. nr. 2868) týsdagin tann 13. mars 2001 kl. 16.00 í hølum felagsins Óðinshædd 2 í Tórshavn.

Skráin fyri fundin er henda:

1. Val av fundarstjóra.
2. Frágreiðing frá nevnd felagsins um virksemi felagsins í farna roknskaparári.
3. Framløga av grannskoðaragóðkendum ársroknskapi felagsins til góðkenningar og ársfrágreiðing.
4. Støðutakan til nýtslu av avlopi ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapinum.
5. Val av nevnd.
6. Val av grannskoðara.
7. Støðutakan til uppskot um at hækka partapening felagsins og broyting av viðtøkum felagsins í hesum sambandi, hareftir partapeningur felagsins verður hækkaður við millum 3 og 4 mió. kr. í áljóðandi virði. Verandi partaeigarar hava lutfalsligan framíhjárætt til at tekna nýggja partapeningin umframt subsidiæran rætt til at gera nýtslu av ikki útnyttaðum framíhjátekningsrætti. Tekning kemur at fara fram á tekningarlistum, sum fráboðan verður givin um smb. § 34 í partafelagslógini.
8. Ymiskt.

**Nevndin**



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

# Dupulthús við Villingardalsvegin til leigu

Húsini eru í góðum standi, í tveimum hæddum og við sera góðum útsýni. Hvør hæddin er uml. 63 m².

1. hædd: Forstova, bryggers, tvey kømur og eitt stórt baðiverilsi.
2. hædd: Arbeiðsligur køkur/stova & stórt hjúnarúm.
Fittligur havi er um húsini.

Prísuppskot: 5.500- 6.000,- pr. mðr. + ljós og hita.
Leigusáttmáli fyri eitt ella tvey ár.

Skriva til:
**Sosialurin,**
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 21.02.

# ÚTSØLAN

**byrjar mikudagin 28. feb. kl. 9.00 við nógvum góðum**

**TILBOÐUM**

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05

Sosialurin - 311820



**Stillads Forskalling**
**Er ætlan at keypa ella leiga:**
- **Forskalling og tilhoyr**
- **Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør v.m.**
- **Facadestillads**
- **Trygdarrækverk**
- **Aluminium rullustillads**
- **Arbeiðsplatformar**

THYSSENKRUPP -HÜNNEBECK
Leverandørurin til Føroysk byggivirkir í 28 ár
Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820




# Leiðsla og Samstarv

Veitst tú, at fakligi leiðarin eisini er starvsfólkaleiðari. Undrast tú, hví tað ofta er so trupult at fáa starvsfólk og leiðarar at samstarva? Vilt tú vita, hvat vit skulu hava fyri eygað, um vit skulu hava bólkar og einstaklingarnar í bólkunum at virka á besta hátt? Vilt tú læra nakað um nútímans starvsfólkaleiðslu, leiðaraleiklut- og stíl? Vilt tú vita, hvussu vit kunnu arbeiða við verk- og samskipan (organisatión) í dagliga arbeiðinum, og hvussu vit skipa fundir og fundararbeiði á ein skilagóðan hátt?

## Endamál

Endamálið er at geva luttakaranum innlit í, hvussu dagliga virksemið á arbeiðsplássinum kann mennast við nýggjastu starvsfólkaleiðsluamboðunum og nýggjastu socialpsykologisku vitanini á hesum øki. Tú fært eitt ávíst innlit í sálarfrøðiligt arbeiðsumhvørvi, strongd og hvussu tú kanst handfara ósemjur. Tú kanst fáa innlit í, hvussu vit kunnu fremja ella darva plan-legging, og hvussu vit kunnu leggja tíðina betur til rættis. Tú kanst læra, hvussu vit kunnu skipa fundir so, at teir ikki bert eru tíðartjóvar, men leiðslu-, organisatións-, býtis- og skiftisamboð.

## Málbólkur

Skeiðið er ætlað leiðarum og starvsfólki í privatum og almennum fyritøkum, ið ynskja leiðslu- og persónliga menning.

**Skeiðleiðari:** **Bergur Godtfred**
**Dagar:** 6/3, 8/3,13/3,15/3 Kl. 16.00-20.00
**Kostnaður:** Kr. 2.600,00 íroknað frálæru, tilfar og mat.
**Tilmelding:** Í seinasta lagi 1. mars 2001

***Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg.***
***Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til***

**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH**
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo

i
Sosialurin

www.sosialurin.fo

# Longur opið á
### Kommunalu Brennistøðini

Endamálið við at hava opið longur, er at lættari skal verða at sleppa av við burturkast.

Jarn frá vinnuvirkjum og bilvrak verður ikki móttikið leygardag.

**Opið er hvønn leygardag frá kl. 13.00-17.00.**

Umframt er opið:
mánadag, mikudag og fríggjadag: **kl. 08.00-17.00**
týsdag og hósdag: **kl. 08.00-20.00**

Tórshavnar kommuna

Kommunala Brennistøðin

# Kunngerð um elprísir v.m.

SEV

**Gjørt verður kunnugt, at gjaldskráin hjá SEV frá 1. januar ár 2001 er óbroytt í mun til ár 2000. Gjaldskráin uttan MVG er hendan fyri hvørja elinnlegging:**

| Ársnýtsla | Fast gjald: | Prísur kr./kWh: |
|---|---|---|
| 0 – 10.000 kWh | 480,00 kr./ár | 1,11 |
| 10.0000 – 100.000 kWh | 1.280,00 kr./ár | 1,03 |
| yvir – 100.000 kWh | 5.280,00 kr./ár | 0,99 |

Undantikið tá streymveitingin er slitin vegna brek á innleggingini, eftirstøðu ella av aðrari orsøk, har málarin ikki verður niðurtikin, verður fasta gjaldið bert kravt fyri tíðina, innleggingin er íbundin hjá S.E.V.

Innleggingar, ið ikki verða nýttar, men enn ikki eru uppsagdar, skulu gjalda fast gjald, sum eigarin ber ábyrgd av.

**Ídnaður, landbúnaður, fiskivinna og fiskaaling**
Serstøk gjaldsskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur. Gjaldsskráin uttan MVG fyri nevndu vinnur er henda fyri hvørja innlegging:

| Ársnýtsla: | Fast gjald: | Prísur kr./kWh: |
|---|---|---|
| 0 – 10.000 kWh | 480,00 kr./ár | 1,11 |
| 10.0000 – 20.000 kWh | 1.280,00 kr./ár | 1,03 |
| yvir – 20.000 kWh | 8.480,00 kr./ár | 0,67 |

Neyvari upplýsingar um, hvørjar vinnugreinar koma undir hesa gjaldskrá, fáast við at venda sær til eina av skrivstovum elfelagsins.

**Ymisk ómaksgjøld v.m.**
Verða gjøld ikki goldin rættstundis sambært rokning/giroinngjaldskort, verða fyri hvørjar byrjaðar 100 kr. av rokningsupphæddini lagdar kr. 1,00 afturat rokningini hvønn byrjaðan mánað, til falna skuldin er goldin. Harafturat skulu gjaldast kr. 15,00 fyri hvørja áminning.

Tá neyðugt er at taka stig til at slíta streymveitingina vegna eftirstøðu, skulu gjaldast kr. 200,00 í ómaksgjaldi.

Fyri íbinding aftaná slíting vegna eftirstøðu skulu gjaldast kr. 200,00 í ómaksgjaldi. Um íbundið verður uttanfyri vanliga arbeiðstíð eftir áheitan frá eigara/brúkara, verður ómaksgjaldið kr. 300,00.

Málarin kann verða kannaður, tá biðið verður um tað.

Um málarin er í lagi, verða kr. 200,00 kravdar í ómaksgjaldi.

**Flyting**
Tá flutt verður, skal málarin lesast av, og SEV skal hava fráboðan um avlesturin. Tann, sum flytur, hevur skyldu at gjalda, til málarin er avlisin.

**Fyribils streymveiting**
Tá fyribils streymveiting verður veitt til byggpláss, stuttleikaøki o.a., eru hesir prísir galdandi:
Fast gjald: Eftir vanligu gjaldsskránni.
Elorkugjald: 10% afturat prísinum eftir vanligu gjaldsskránni.
Trygd: Kann verða kravd.

Allar útreiðslur í sambandi við fyribils streymveiting, so sum styrking av neti ella víðkan, verða goldnar frammanundan eftir rokning.

**MVG**
Afturat omanfyri nevndu gjøldum verður roknað MVG.

**Annað**
Gjørt verður vart við, at í gjaldskránni eru eisini serstakar reglur galdandi fyri íbindingargjøld og ískoyti til ávísar innføringarkaðalar.

Harafturat hevur SEV heimild at taka eitt tiltøkugjald (effektgjald) uppá 1.100,- kr. fyri hvørt kW í installeraðum framleiðslumátti hjá kundum, ið sjálvir framleiða elmegi og samstundis brúka SEV sum trygd, tó í mesta lagi svarandi til teymasikringina.

Gjaldskráin kann fáast við at venda sær til eina av skrivstovum elfelagsins.

Tórshavn, tann 23. februar 2001

**Elfelagið S.E.V.**